Úr myndasavninum hjá Manna W. Høgnesen:

# Gamlar myndir úr Klaksvík



*Myndin er tikin tá Bilstøðin Bil í Klaksvík byrjaði í 1964. Bilarnir eru f.v.: Morris Oxford, Simca Aronde, Opel Kaptain, Ford Zephyr og Peugeot 404*



*Soleiðis var flutningurin av bilum í gomlum døgum. Myndin er tikin í Klaksvík í 1968, tá "Gardar" sigldi yvir um fjørð. Ein hvítur Mazda 1500 er júst hivaður umborð*



*Fyrsta nýggja ambulansan í Klaksvík: Ein Mercedes-Benz nr. Fø.5581*



***Í 1975 løgdu støðirnar Bil og Auto í Klaksvík saman og bygdu hesa nýggju støðina. Bilarnir eru f.v.: Toyota Crown, Ford Taunus, Toyota Crown, Mazda 929, Toyota Crown, Toyota Crown, og Fiat 132. Sum tað sæst á myndini er meira enn helmingurin av bilunum av merkinum Toyota Crown. Støðin hevði telefon nr. 55555.***



*Ein kranabilur hjá Hugo Gardar, sum hivar eina maskinu uttanfyri Klaksvíkar Dampvaskarí í 1969. Bilurin er ein Ford Thames Trader (nr Fø.452)*



*Myndin er tikin á keiuni í Klaksvík í sambandi við móttøku av Fisher Heinesen í 1955. Hetta var undir læknastríðnum. Vit síggja gomlu 8-kantaðu kioskina og fleiri bilar. Bilarnir fremst á myndini eru ein Standard Vanguard frá uml. 1954 og ein Morris Oxford frá 1952 (við føroyskum flaggi). Við kioskina stendur ein Austin A30*